# Anestesisjúkrarøktarfrøðingur til Anestesideildina

**Fyri anestesisjúkrarøktarfrøðing sum skal í farloyvi í tvey ár, søkja vit eftir avloysara fyribils frá 1. juli 2011 til og við 30. september 2011. Talan er um eitt fulltíðarstarv við tilkallivakt**

Arbeiðið á Anestesideildini fevnir í høvuðsheitum um at doyva sjúklingar til skurðviðgerðir innan fleiri sergreinir, sum t.d.: Ortopædi, Gyn/Obst., Alm.kir., Urologi, Plastikkir., Oyra/Nasa og Háls, Tannviðg., o.a. Aðrar anestesiveitingar verða givnar til deildir á LS., undirvísing av starvsfólki og lesandi, umframt at vit eru við, tá bráðfeingis sjúkraflutningur er.

**Førleikakrøv:**
- Prógv og góðkenning sum anestesisjúkrarøktarfrøðingur
- Sóknast verður eftir einum starvsfelaga við góðum samstarvsevnum, og sum er tænastusinnað/ur, framtakshugað/ur, fleksibul og kann arbeiða sjálvstøðugt.

Anestesideildin er fyrisitingarliga partur av Bráðdeplinum og kann bjóða eitt fjølbroytt og spennandi arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á góðsku og høgt fakligt støði.

**Setanartreytir:**
- Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Óluvu Lómstein, deildarleiðara, tlf. 304500, lokal 5757, lsolulo@ls.fo ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing lokal 5102, lsastjo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er**
**30. mai 2011 kl. 12.00**




# Leiðslufulltrúi

**Á Skurðdeplinum er eitt starv sum leiðslufulltrúi leyst at søkja til setan 1. juni 2011 ella eftir avtalu. Næsti fyrisetti er depilsleiðslan, sum fevnir um leiðandi yvirlækna, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing og leiðandi ljósmóðir**

Skurðdepilin stendur fyri øllum skurðvirkseminum umframt viðgongu- og barsilsøkinum á Landssjúkrahúsinum. Á deplinum arbeiða á leið 190 starvsfólk (130 ársverk), og hevur depilin eina fíggjarjáttan á leið 63 milliónir árliga, har meginparturin er markaður til lønir.

**Høvuðsuppgávur í starvinum:**
- Íverkseting og menning av nýggjum átøkum á deplinum
- Verkætlanarstýring
- Gera mánaðarlig yvirlit yvir viðkomandi fíggjarstøður
- Útgreina neyðug lyklatøl fyri raksturin á deplinum
- Taka sær av lønarskipanini, gera vaktarætlan og taka sær av vaktarplanskipanini á læknagongini
- Umsita læknamanningina við atliti til fíggjarkarmin og umsita lýsingar og tilmæli til setanir
- Veita deildunum á deplinum neyðuga hjálp við vaktplan
- Taka sær av skeið- og tænastuferðum á deplinum
- Hava ábyrgd av heimasíðuni fyri depilin
- Journalisering
- Samskipa og fyrireika fundir í deplinum og verða skrivari á hesum

Harafturat eru fleiri fyrifallandi uppgávur, sum stinga seg upp í tí dagliga

**Førleikakrøv:**
- Hevur útbúgving frá hægri lærustovni á bachelor- ella masterstigi
- Hevur hollan kunnleika til fíggjarstýring og fyrisiting
- Er sinnað/ur at veita góða tænastu bæði innanhýsis og uttanfyri depilin
- Er loyal/ur, fryntlig/ur og fyrikomandi

**Skurðdepilin kann bjóða:**
- ein depil í støðugari menning, bæði fakliga og fyriskipanarliga
- eitt dynamiskt fjølbroytt og spennandi arbeiði við ábyrgdarfullum uppgávum
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Midjord, leiðandi yvirlækna, tlf. 304500, lokal 5100, lsjakmi@ls.fo ella til Astu Joensen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, tlf 304500, lokal 5102, lsastjo@ls.fo

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin er**
**30. mai 2011 kl. 12.00**

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

*Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:*

***Landssjúkrahúsið***
***Lønar- og starvsfólkadeildin***
***FO-100 Tórshavn***

***ella á teldupost adressu:***
***umsokn@ls.fo***